**Tíðindaskriv 28. august 2012**

Eik Banki P/F
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO-110 Tórshavn

Tel.: 348000
Fax.: 348800

office@eik.fo
www.eik.fo

Swift: EIKB FO TF
Pf. skr. nr.: 5534

# Eik góðar 25 mió. kr. í avlopi eftir skatt fyrra hálvár

**Hálvársroknskapurin hjá Eik Banka vísir eitt avlop upp á 25,2 mió. kr. eftir skatt. Fyri skatt er úrslitið 31,1 mió. kr. Fíggjarstøðan javnvigar við 8,1 mia. kr. og eginpeningur bankans er 1,3 mia. kr.**

"Fyrra hálvár hjá Eik Banka hevur hilnast væl. Úrslitið vísir, at vit eru á rættari kós, og Eik heldur fast við útlitini um avlop fyri árið 2012", sigur Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri í Eik Banka.

Í stuttum kann nevnast, at:

- Úrslitið áðrenn skatt, regulering av kapitalpørtum og niðurskrivingum er eitt avlop á 73 mió. kr.
- Minkingin av útlánum bankans er mest sum steðgað
- Innlán eru økt við 102 mió. kr. síðan árslok 2011
- Fyrra hálvár hevur bankin framt niðurskrivingar fyri 46,4 mió. kr.
- Niðurskrivingar av útlánum, íroknaðar 18 mió. kr. í virðisjavnan av lánum og úrslit av fyribils yvirtiknum ognum eru tilsamans 43 mió. kr.
- Solvensurin við hálvárið er 22,5 prosent
- Yvirdekningur í mun til lógarkravda gjaldførið er 279,1 prosent, t.e. meira enn 3 ferðir lógarkravda minstamarkið
- Framhaldandi útlit um positivan rakstur fyri árið 2012

Útlánini eru 4,9 mia. kr. og eru á sama støði sum við ársenda 2011. Tískil er minkingin í útlánunum steðgað. Harafturímóti eru innlánini 6,4 mia. kr. og sostatt eitt vet hægri enn við ársenda 2011.

Solvensurin er 22,5 prosent og likviditeturin næstan 3 ferðir lógarkravda minstamarkið. Sostatt eru bæði solvensur og likviditetur hjá bankanum góður, og tøkur peningur er til at afturrinda 1 mia. kr., sum er eftir av statsveðhildnu skuldini.

Nettorentuinntøkurnar eru lægri enn sama tiðarskeið í fjør og kemst hetta av minking í útlánunum í 2011 og einum lægri rentumarginali enn higartil í 2012. Somuleiðis eru útreiðslur til starvsfólk og umsiting minkaðar fyrra hálvár 2012 í mun til fyrra hálvár 2011.

## Niðurskrivingar

Bankin hevur fyrra hálvár framt niðurskrivingar fyri 46,4 mió. kr. Rakstrarútslitið er tí framvegis nakað merkt av niðurskrivingum upp á ognir, sum eru yvirtiknar frá gamla Eik Banka.

**Nærri upplýsingar:**
Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri, tlf. 348 580, teldupostur: ssj@eik.fo